ítróttur

Nr. 6 • leygardagur • 10. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ingi væntandi við

**Líkt er til, at spælskiparin er komin somikið væl fyri seg, at hann verður førur fyri at taka lut í dystinum leygardagin**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Jú, eg haldi tað gongur rætta vegin. Eg havi vant í kvøld, og sjálvt um eg ikki koyrdi 100% á, so haldi – og vóni eg – at eg nú eri somikið frægur, at eg fái verið við leygardagin.

Tað eru upplyftandi boðini, sum Ingi Olsen hevði at bera, tá vit hóskvøldið ringdu til hansara at vita, hvørt hann nú er komin somikið fyri seg eftir skaðasteðgin, at hann verður tøkur hjá landsliðnum, nú seinni dysturin móti norska landsliðnum stendur fyri framman.

Skaðin gjørdi, at Ingi als ikki var við í hópinum, sum fór til Noregs, men sjálvur heldur leikarin, at tað var rætta avgerðin at verða eftir í Føroyum.

– Nú havi eg fingið viðgerð fyri skaðan hvønn dag, og sjálvt um eg kanska eisini hevði fingið tað á ferðini, so vildi tað ikki verið rætt, um eg skuldi nýtt tíðina hjá fysioterapeutinum á ferðini. Tá eru tað leikararnir, sum skulu spæla, sum standa fremst í røðini. Og hartil eru eisini onnur geramál á skránni í løtuni, sigur hann flennandi og sipar helst til valstríðið, har Ingi jú er ein av teimum, sum hevur ætlanir um at sleppa inn á ting.



*- Hóast eg ikki var við, so var eg eisini errin av, at hava verið ein partur av tí landsliðnum, sum nú er bygt upp, sigur Ingi Olsen millum annað um dystin, sum liðfelagarnir leiktu mikukvøldið*

## Errin av liðnum

At sita heima og hyggja at, meðan føroyska hondbóltslandsliðið roynir seg í altjóða dysti, man í øllum førum vera ein nýggj uppliving hjá Inga, men hóast hetta helst mundi kennast eitt sindur hugstoytt, so tykist hann á ongan hátt lata seg merkja av hesum.

– Eg má siga akkurát sum er, at eg var stoltur av leikarunum. Høvdu vit kunna valt áðrenn dystin, so høvdu vit fegnir vilja selt hann fyri 12 mál, so úrslitaliga var hatta sera flott av leikarunum. Og hóast eg ikki var við, so var eg eisini errin av, at hava verið ein partur av tí landsliðnum, sum nú er bygt upp.

– Og eg haldi eisini, at normenn vóru eitt sindur skakkir um, at teir hóast alt fingið somikið frægt av mótstøðu. Ikki minst haldi eg, at skotsterku bakkarnir hjá okkum órógvaðu teir nógv, og tað var eisini sjónligt í seinna hálvleiki, har teir regulert fara út í mansverju av Sámali. Tað hevði eg so í øllum førum ikki vænta fór at henda.

Sjálvandi kann tað eisini hjá slíkum spælarum vera tungt at seta seg upp, tá talan er um mótstøðu frá slíkum pinkulingum, sum vit jú eru. Men hinvegin er her talan um leikarar, sum spæla í eitt nú Flensburg og Barcelona, og tá burdi talan verið um eitt sera høgt botn-niveau, men tíbetur var tað ikki so høgt, sum fryktandi var fyri.

## Einastandandi møguleiki

Tá tosið fellir inn á dystin nú leygardagin, so er Ingi eitt sindur í iva um, hvussu hesin fer at spæla av. Men spenningurin í røddini, er tó ikki at fara skeivur av.

– Fyrst og fremst, so er sjálvandi umráðandi, at vit spæla upp til okkara besta. Vit skulu spæla eins skilagott, sum liðið gjørdi tað í Noreg, og so er at vóna, at orkan aftur er til at koyra á alla tíðina. Sjálvandi verður neyðugt við útskiftingum, tí eingin av okkara monnum hevur nakran møguleika fyri at standa seg í 60 minuttir móti hasum monnunum.

– Spurningurin er so sjálvandi eisini, hvussu nógv normenn leggja fyri. Onkur hevur nevnt, at teir kunnu fáa tørv á einum góðum málmuni, men tað haldi eg vera tvætl. Teir vita fullvæl, at vinna teir ikki á Rumenia, so kann tað gera tað sama allíkavæl. Hinvegin kann eisini vera, at menninir nú vilja sleppa úr skugganum á kvinnunum, sum jú hava verið tað stóra innan hondbóltin í Noreg, so tað kann vera, at teir seta fult trykk á. Men tað fáa vit so at síggja, heldur Ingi, sum at enda leggur afturat, at hjá føroysku leikarunum ræður tað einamest um eisini at njóta upplivingina, sum slíkir dystir eru.

– Tað er kanska bara eina ferð í lívinum, at tú fært møguleika at spæla móti teimum stóru liðunum í Europa. Her hava vit leikarar, sum eru heintaðir úr teimum allarbestu, og tað er ein møguleiki, sum vit kanska ikki fáa aftur. Tað er ein uppliving, sum vit eiga at njóta, og tað er samstundis ein uppliving, sum eigur at fáa allar leikarar at stríðast fyri at koma á landsliðið. Kann ein slík gularót ikki fáa teir til tað, so veit eg ikki, hvat tað skuldi verið, sigur royndasti maðurin í føroyska hópinum at enda.



# Tað verður strævið

**Halgir Dahl-Olesen heldur ikki, at normenn vóru serliga væl nøgdir um avrikið seinast, og tí kann tað verða, at teir fara at seta leikferðina væl upp leygardagin**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*- Tað er so ikki á hvørjum degi, at tú kanst standa saman við Glen Solberg úr Barcelona og velja bólt, og hjá mær ráddi bara um at njóta hetta, heldur Halgir*

Liðformaður hjá føroyska landsliðnum í Noreg var sum kunnugt Halgir Dahl-Olesen, og tað er so ein leiklutur, sum hann ikki er so heilt óvanur við.

Ikki tí, teir báðar seinastu dystirnar á Letlands-ferðini var Halgir eisini liðskipari, tá Ingi Olsen hevði fingið ein skaða at dragast við, men eitt eru teir dystirnir, sum vóru á teirri ferðini. Nakað annað er, tá mótstøðumenninir teljast millum teir bestu í heiminum, og sjálvur heldur hoyvíkingurin eisini, at hetta var ein stór uppliving.

– Sjálvt um tað altíð er ein uppliving at vera liðskipari, so sigur tað seg sjálvt, at tað er munur á. Tað er so ikki á hvørjum degi, at tú kanst standa saman við Glen Solberg úr Barcelona og velja bólt, og hjá mær ráddi bara um at njóta hetta.

Nakað annað, sum Halgir heldur ikki er so vanur við, er at skula spæla sum spælskipari. Ein leiklutur, sum hann annars kom sera væl frá í Noreg, men sjálvur dylir hann ikki fyri, at hetta hjá sær er ein stór umstilling.

– Tá eg spæli á bakkinum, soleiðis sum eg eisini geri í H71, so skal eg fyri tað mesta bara hugsa um, hvussu eg komi til skot. Nú skuldi eg hugsa um at skipa spælið og syrgja fyri, at avtalur verða hildnar, so tað var nakað heilt øðrvísi, heldur Halgir.

Um dystin annars heldur Halgir, at liðið stríddist sera væl. Eisini hóast tað í seinna hálvleiki var ófatuliga tungt at vera við.

– Tá tú ert aftan fyri við somikið nógvum málum, so er tað altíð tungt at toga seg sjálvan uppaftur. Men vit royndu alt tað, sum vit kundu, og sjálvt um tað kanska verður enn tyngri leygardagin, nú vit hava tveir somikið tættar dystir, so góvu vit alt, sum vit høvdu í okkum.

## Bakkarnir avgerandi

Hóast normenn eftir dystin mikukvøldið tóktist lata væl at egna avrikinum, so ivast Halgir Dahl Olesen tó í, um teir nú kortini vóru so nøgdir. Og tað roknar hann við, kann fáa týdning fyri dystin nú leygardagin.

– Tað er einki at ivast í, at leikararnir hjá teimum høvdu roknað við einum størri sigri enn tey 12 málini, sum vóru á muni mikudagin, og sjálvur haldi eg í øllum førum, at teir undirmettu okkum eitt sindur. Tað gjørdi so tað, at teir ongan helst tóku nakað lætt upp á uppgávuna, og tá so er, so er tað ótrúliga ringt at fáa ferðina uppaftur. Vit bóru eisini alla tíðina ótta fyri, at teir fóru at seta meira á mikudagin, men tíbetur hendi tað ikki, tí sum var, so var tað ríkiliga høg ferð til okkum.

– Men hetta kann viðføra, at tað fer at verða uppaftur truplari hjá okkum leygardagin. Eg rokni í øllum førum við, at spælararnir nú fara at leggja meira fyri, og so mugu vit bara stríðast ímóti.

Hvussu ætla tit so at gera tað?

– Enn hava vit so ikki fingið nakað upplegg til dystin, so eg fái ikki sagt nakað um spæliætlanina. Men sjálvur haldi eg, at vit sleppa nokk so væl frá bakk-plássunum, har teir nokk ikki roknaðu við, at vit vóru somikið væl fyri. Sveinur og Sámal skjóta jú ótrúliga væl, og sleppa teir inn um tríggja-meturin, so beri eg ongan ótta fyri, at vit ikki skora eins nógv sum mikudagin. Hinvegin kann tað verða sera tungt, um teir fara at verja meira offensivt, soleiðis sum teir gjørdu í seinna hálvleiki.

# Brak í Vestmanna

**Longu fyrsta umfarið verður satt hondbóltsbrak í Vestmanna, tá VB og VÍF fara at gera av, hvør longu nú skal detta enn longur aftur um Stjørnuna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Higartil hetta kappingarárið hevur VB vunnið greitt í innanhýsis uppgerðunum móti VÍF*

Tá sæð verður burtur frá landsdystinum hjá monnunum móti Noreg, so er einki at ivast í, hvør stórdysturin hetta vikuskiftið er.

Longu fyrsta umfarið í endaspælinum bresta tey bæði bestu liðini frá seinasta kappingarárið saman, og tó at hvørki teirra í løtuni er oddalið, so er dysturin ikki minni týdningarmikil hesaferð.

Sum støðan er á stigatalvuni í løtuni, so er tað Stjørnan, sum hevur fyrimunin frá fyrsta bríksli, og fyri taparin av hesum dystinum man tað fara at kennast sera tungt, um frástøðan longu nú skal økjast upp í fýra ella fimm stig.

Tað fær tó ikki verið annað enn merkisvert, at kappingin er løgd soleiðis til rættis, at tvey av liðunum, sum undan kappingini vórðu roknaðir sum gullkandidatar, skulu hittast somikið tíðliga í kappingini. Sjálvandi skulu øll liðini spæla tvær ferðir móti hvørjum øðrum, men fyri spenningin hevði ivaleyst verið best, um tað kundi verið lagt soleiðis til rættis, at bestu liðini tornaðu saman í nøkrum veruligum oddabrestum seinastu umførini.

Slíkar tankar hava tó hvørki VB ella VÍF ráð til at hugsa um vikuskiftið. Har ræður snøgt sagt um at vinna dystin!

## Neistin liggur framvið

Og einki er at ivast í, at hini bæði liðini, sum eisini dystast í oddinum, fara at fáa fult í sínum uppgerðum um vikuskiftið.

Stjørnan, sum tykist vera í ferð við at skræða seg frá hinum, skal sunnudagin á vitjan á Skála. Tilsvarandi dysturin í grundspælinum endaði við javnleiki, men síðani tá er tó nógv vatn runnið í ánni, og bæði í stryki og á stigatalvuni hava bæði liðini eisini førka seg í hvør sína ætt síðani tá.

Neistin var fyri stóran part av grundspælinum í einum slag av ongamannalandi, men við einum góðum spurti – og sigri í Vági – eydnaðist teimum tó at ota seg heilt upp móti oddinum, og tað kann so ikki roknast við, at tær fara at oyðileggja sær hesa støðuna sunnudagin. Tá er tað Søljan, sum er mótstøðuliðið, og tó at vágakvinnurnar fingu eitt kærkomið stig á Skála seinasta vikuskiftið, so kann neyvan roknast við, at tær fara at gera tær stóru skreytirnar hesaferð.

## 1. Deild kvinnur

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 300 | 225 | 75 | 11 |
| 2 VÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 304 | 255 | 49 | 9 |
| 3 VB | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 309 | 236 | 73 | 8 |
| 4 Neistin | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 316 | 272 | 44 | 8 |
| 5 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 272 | 314 | -42 | 5 |
| 6 Søljan | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 221 | 295 | -74 | 2 |
| 7 Kyndil | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 192 | 317 | -125 | 1 |